# Uttanstrok og nýkveikjari

## Ein lýsing av Tony Blair og politikki hansara



*Eftir Hanus Kamban*

***ANNAR PARTUR***

Bardagin móti Saddam

### Peter Thomson

Í fyrsta parti av hesi greinarøð varð nomið við nakrar streingir í teirri tilgongd, sum í 1997 førdi Tony Blair fram at valdinum í Bretlandi. Men sjálvsagt er øll henda søgan fløktari og rúmligari, enn her er greitt frá. Tá ið sagt varð, at Blair í 1983 var eitt óskrivað blað, er hetta bara rætt, um hugsað verður um politiska vitan og hugmyndafrøði.

Sum øll onnur menniskju hevði Blair eitt slag av viðføri, og sum mong onnur varð hann sum ungur ávirkaður av kveikjandi persónum. Tann maður, sum kanska fekk størst týdning fyri hann, var ein australskur prestur, Peter Thomson at navni. Thomson las í Oxford árini 1972-74 og var hesi árini, sum vanligt er á enskum lærdum háskúlum, ráðgevi ("tutor") hjá yngri lesandi, teirra millum eisini Tony Blair.

Thomson hevði tað, sum í dag verður rópt karisma, eina medferð, har álvarsamur kristindómur, skemtingarsemi, ein floymur av nýggjum hugskotum og eitt ávíst respektloysi gjørdu seg galdandi. Hann legði dent á, at kristindómur bara hevði týdning, um hann gagnaði vanligum menniskjum og hevði við sær bata av sosialum, ella enntá sosialistiskum, slag. Blair segði seinni um Thomson, at hann var "eitt tað mest kveikjandi, heiðurliga og reiðiliga menniskjað, eg havi hitt". Hann var, segði ein annar eygleiðari, "ein blandingur av prædikumanni og rokkstjørnu, átrúna og mótmentan".

### John Macmurray

Peter Thomson vakti Blairs áhuga fyri einum bretskum heimspekingi, sum um hetta mundið var púra gloymdur. John Macmurray varð føddur í 1891. Hann luttók í fyrra heimsbardaga og kom av sínum royndum frá bardaganum til ta sannføring, at í lívinum var eitt hægri mál enn njóting. Hann gjørdist fyrst fyrilesari í heimspeki í London og endaði sum professari í "moral philosopy" við Lærda Háskúlan í Edinburgh.

Macmurray hevði serligan áhuga fyri sambandinum millum menniskja og samfelag. Hvat av hesum skuldi hava yvirvág? Hvørki, helt Macmurray. Tann evsti veruleikin var hvørki at finna í tí einstaka ella í samfelagnum, men kundi einans til fulnar verða til og spretta í tí sínámillum ríkandi samvirkinum millum menniskja og menniskja.

Macmurray er sum heimspekingur ikki virdur av øllum, og soleiðis sum Anthony Seldon endurgevur hana, ljóðar hansara læra bæði sjálvsøgd og sonn, men samstundis hvørki djúp ella fleirstrongd. Men tað sum hevur týdning í okkara sambandi er, at hansara hugsanir fingu ávirkan á tann unga, óbúna og viðkvæma Tony Blair. Tá ið Blair í heilum vendir aftur til hugtakið *community* (felagsskapur, grannalag), er talan um ávirkan frá Peter Thomson og frukt av Macmurray-lesnaði. Serliga ein setning eftir Macmurray hevði Peter Thomson tokka til:

*Allur kunnleiki við meining í skal gagna gerðini, øll gerð við meining í skal gagna vinskapi.*

### Fullveldi ikki longur heilagt

Tað er vanlig hugsan, at tað var tað amerikanska nýafturhaldið, sum - við íblástri frá andsmennum sum Irving Kristol og Leo Strauss - á fyrsta sinni í nýggjari tíð vendi pragmatismuni bakið og slóðaði fyri idealistiskum uttanríkispolitikki í heiminum. Hetta er ikki bara rætt. Hvat viðvíkir ítøkiligum politikki, tykist Tony Blair her at vera slóðbrótari. Blair sá, ávirkaður av Macmurray og síni egnu kristnitrúgv, heimin í manikeiskum ljósi, sum ein vígvøll, har gott og ilt glímdust.

Henda lívssjón kom serliga at standa sína roynd í 1999, tá Kosova kom í brennidepilin. Tann serbiski forsetin Slobodan Milosevic brúkti harðskapin hjá tí albansku frælsisrørsluni sum undanførslu til at fremja etniska reinsan móti albanum í Kosova, á sama hátt sum hann frammanundan hevði gjørt í Bosnia. Tony Blair gjørdi seg tá til ídnan og sannførdan talsmann fyri uppílegging, og tá bumbuálop frá NATO ikki hjálptu, talaði hann fyri at senda hermenn til Kosova. Saman við stuðuli frá m.a. Russlandi var henda hóttan við til at kyrra serbar.



*Tony Blair í 1995 saman við sínum lærara og andaliga vegleiðara, tí australska gudfrøðinginum Peter Thomson*

Tá ið hesar hendingar fóru fram, helt Tony Blair sína týdningarmestu uttanríkispolitisku røðu, á fundi í Chicago tann 22. apríl 1999. Í røðuni førdi hann fram, at tað kanska bleiv neyðugt, á gáttini til 21. øld, at endurskoða siðbundin sjónarmið um tjóðarfullveldi, og at menniskjaligar grundir kundu vera til við harðskapi at forða frælsum londum at fremja yvirgang móti fólki ella tjóðum.

### George W. Bush

Hálvt triðja ár seinni kom so, sum vit øll vita, tað ræðuliga álopið á World Trade Center í New York. Eftir tann 11. september 2001 kom Tony Blair at hava eitt drúgt og tætt samstarv við ein ríkisovasta, sum á mangan hátt var honum ólíkur. George W. Bush var ein bygdasligur texanari, oljugreivi, vinur teirra ríku og talsmaður fyri deyðarevsing (sum hann sum landshøvdingi læt fremja íðiliga), Tony Blair var javnaðarmaður, europeari og humanistur.

Tað er kortini týðiligt, at størri skyldskapur var millum hesar menn, enn hildið hevur verið. Báðir vóru liberalistar og trúgvandi kristnir, og báðir løgdu, ið hvussu er í orðum, dent á idealismu í uttanríkispolitikki. Bush kom skjótt undir sterka ávirkan frá tí Neo-Con-bólki, sum í einum kasti bæði vildi demokratisera alt Miðeystur-økið og samstundis, og á tann hátt, skapa gott grannalag millum Ísrael og arabisk lond.

Tá ið gjørt varð av at fara í bardaga móti Saddam Hussein og stýri hansara á vári 2003, var tað rationella grundarlagið undir avgerðini púra í samsvari við sjónarmiðini hjá Tony Blair, sum